Skrivligur fyrispurningur
eftir § 52a í Tingskipanini

Spyrjari: Uni Holm Johannesen, løgtingsmaður

Svarari: Ruth Vang, landsstýriskvinna í fíggjarmálum

Evni: Vitlíki og almennir stovnar

Spurningar:

1. Nær verður almenna heildarætlanin um vitlíki liðug og løgd fyri Løgtingið at skifta orð um?
2. Hvørji stig ætlar landsstýriskvinnan at taka komandi tíðina, so vitlíki kann setast í verk og brúkast í almenna geiranum?
3. Hvørji dømi eru um, at almennir stovnar hava lagt um og gagnnýtt vitlíki í sínum arbeiði í 2025, og hvussu er produktiviteturin í arbeiðstíðini ávirkaður av hesum sama?

Viðmerkingar:
Vitlíki fer komandi árini at lætta munandi um arbeiðsgongdirnar á nógvum almennum arbeiðsplássum. Uppgávur kunnu loysast við færri arbeiðstímum, og tað fer at broyta arbeiðsdagin hjá nógvum starvsfólkum. Spurningurin er nú fyrst og fremst, hvussu skjótt og skipað tað skal setast í verk.

Í øðrum londum er vitlíki farið at arbeiða við ávísum umsitingarligum uppgávum, sum er við til at stytta bíðitíðirnar hjá borgarum og geva starvsfólki betri tíð at hugsavna seg um aðrar uppgávur - tildømis, tá skrivlig arbeiði, lóggávuarbeiði, roknskapareftirlit, røntgenmyndir, undirvísingarætlanir, forritarauppgávur, veðurforsagnir og nógv annað skulu gerast og greinast. Í Føroyum eru eisini dømi um hetta sama, umframt kjattbottar, ið skriva og skilja føroyskt, og sum kunnu leiðbeina og svara spurningum frá fólki alt samdøgrið.

Politiskt er tað neyðugt at hava tamarhald á tøkniligu umskipanini, so rætt verður farið fram – eisini við atliti at dátuvernd og trygd. Í heyst fór landsstýrið so undir tiltrongda arbeiðið at gera eina heildarætlan um vitlíki og orða eina visión fyri almennu nýtsluna av vitlíki.

Onnur Norðurlond eru frammarliga á økinum. Í Finnlandi verður arbeitt miðvíst við vitlíki og automatisering. Norra hevur sett sær fyri at vera fremst í talgildingini, har almenni geirin skal vera ein drívmegi. Í Svøríki hava tey eisini góðar royndir at vísa á,

og ein dagførdur vitlíkispolitikkur skal eftir ætlan leggjast fram í vár. Og í Danmark eru tey eisini so smátt farin at seta vitlíkisskipanir í verk í almennu umsitingini, heilsuverkinum, eldrarøktini og aðrastaðni, og stjórnin hevur sett sær fyri, at vitlíki skal leysgeva 30.000 ársverk fram til 2035, sum ístaðin kunnu brúkast aðrastaðni í almenna geiranum.

Fyri at fáa innlit í broytingarnar, sum fara fram her heima, og hvussu landsstýrið ætlar at handfara hetta frameftir, so verða hesir spurningar settir.

Á Løgtingi, 7. januar 2026

Uni Holm Johannesen